# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK@
SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*- Eg havi hugsað um møguleikan at fara heim at spæla aftur, men eg havi so líðandi tikið avgerðina um, at eg verði verðandi í Danmark.*

*Andrew av Fløtum, føroyskur fótbóltsspælari í Fremad Amager*

# GÍ skal fóta sær og leggja fót fyri EB/Streym

**GÍ hevur ikki vunnið seinastu tríggjar dystirnar, og sunnudagin vitjar besta liðið í kappingini higartil í Gøtu. Bæði liðini eru væl mannað til dystn**



GÍ-EB/STREYMUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Ein tann mest spennandi dysturin í Formuladeildini hetta vikuskiftið verður spældur í Gøtu sunnudagin. GÍ fær vitjan av EB/Streymi, og tað er ein dystur millum tvey av fremstu liðunum í deildini.

Støðan hjá teimum báðum liðunum er eitt sindur ymisk. GÍ hevur ikki vunnið seinastu tríggjar dystirnar og tykist steðga eitt sindur upp eftir eitt framúr kappingarár. EB/Streymur vann stórsigur í seinasta dystinum og liggur einsamalt á odda í Formuladeildini.

Fyri GÍ hevur tað stóran týdning, at liðið vendir skeivu gongdini og blandar seg upp í oddastríðið aftur, og tað kann bara gerast við einum sigri sunnudagin. Tapir GÍ dystin, eru teir seks stig aftanfyri EB/Streym, sum enntá hevur ein dyst til góðar.

### Allir klárir

EB/Streymur spældi mikukvøldið ímóti B68, men hóast stutt er frá liðið síðani seinasta dystin, eru allir spælararnir tøkir til dystin í Gøtu.

Trímálsskjúttin Arnbjørn Hansen vandi ikki hóskvøldið, tí hann var sjúkur, men roknað verður við, at hann verður klárur til sunnudagin.

Toppskjúttin hjá ÍF Føroyum, Jørgen Meitelberg, hevur vant við EB/Streymi seinastu vikuna, men hann spælir ikki fyri liðið áðrenn summarsteðgin.

### Eitt leikbann í Gøtu

GÍ hevur so at siga allar spælararnar tøkar til dystin. Poul Arni Jacobsen, sum varð útvístur í næstseinasta dysti hjá GÍ, hevur fingið leikbann í tveir dystir, og tí kann hann ikki spæla við ímóti EB/Streymi.

Pól Ennigarð, sum hevur verið skaddur í fleiri vikur, er komin so mikið fyri seg aftur, at hann verður við í hópinum til dystin ímóti EB/Streym. Magni Jarnskor hevði leikbann í seinasta dystinum, men hann er tøkur aftur.

| | 06 | 05 | 05 | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| GÍ-EB/S | - | 1-5 | 1-2 | 1-3 | 3-3 | 3-0 | 4-0 | - | - | - | - | - | 3-1-2 | 13-13 |
| KÍ-Skála | 2-2 | 0-0 | 0-2 | 1-1 | 7-0 | 4-0 | - | - | - | - | - | - | 2-3-1 | 14-5 |
| VB/S-HB | - | 2-2 | 1-0 | 0-2 | 2-3 | 0-0 | 2-0 | 0-0 | 1-0 | 1-1 | 1-1 | 1-0 | 4-5-2 | 11-9 |
| B68-ÍF | - | - | - | 2-0 | - | - | - | - | 1-2 | 3-3 | 1-3 | 1-1 | 1-2-2 | 8-9 |
| B36-NSÍ | 1-1 | 2-0 | 0-1 | 1-1 | 2-0 | 1-3 | 1-0 | 5-0 | 3-2 | 2-0 | 3-2 | - | 7-2-2 | 21-10 |

# Andrew heldur fram í Fremad Amager

**Hósdagin var fyrsta venjingin hjá danska 1. deildarfelagnum Fremad Amager. Millum spælararnar til venjingina var Andrew av Fløtum, sum annars hevði umhugsað at koma heim til Føroya at spæla**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Andrew av Fløtum fer eisini næsta árið at spæla fyri danska felagið Fremad Amager, sum spælir í næstbestu donsku deildini.

- Eg havi eitt ár eftir av sáttmálanum við teir, men eg hevði møguleikan at sleppa leysur av sáttmálanum, um eg fór heim til Føroya at spæla, sigur Andrew av Fløtum.

- Eg havi hugsað um møguleikan at fara heim at spæla aftur, men eg havi so líðandi tikið avgerðina um, at eg verði verðandi í Danmark og taki í øllum førum eitt kappingarár afturat her, sigur hann.

### Spæla ímóti AaB

Hósdagin var fyrsta venjingin hjá Fremad Amager, og vant verður dúgliga næstu vikurnar, tí danska 1. deild byrjar longu um tríggjar vikur.

Fremad Amager fer um vikuskiftið til Jútlands á ferð. Leygarmorgunin skulu Andrew og teir spæla venjingardyst ímóti AaB, har Súni Olsen og Jón Rói Jacobsen spæla.

Seinni verða eisini aðrir venjingardystir – millum annað ímóti donsku meistarunum í FCK.

## Skála trívist væl í Klaksvík

### KÍ-SKÁLA

*Jóannes Hansen*

Fótbóltslagið á Skála er ikki so galið. Eftir trilvandi fyrsta part av kappingini hevur gongdin seinastu vikurnar verið rætta vegin. Móti HB og NSÍ hekk spælið væl saman, men málmøguleikarnir vóru fáir og smáir. Móti GÍ á heimavølli sunnudagin var spælið gott, og Skála spældi seg til fleiri upplagdar møguleikar.

- Vit megnaðu ikki at fáa mál. Um vit framvegis megna at spæla okkum til møguleikar, so fara málini eisini at koma, siga teir av Skála.

Allir teir somu eru tøkir, sum spældu í málleysa javnleikinum móti GÍ. Pætur Dam Jacobsen og Bjarni Jørgensen eru farnir at renna aftur, men teir vera neyvan við í Klaksvík, har Skála bara eina ferð hevur tapt.

- Vit trívast væl har norðuri, og vit rokna avgjørt við at fáa úrtøku burturúr vitjanini hesa ferð, siga skálamenn, sum ikki hava vunnið síðani 6. juni, tá ið teir í 11. umfari vunnu 2-0 í Fuglafirði.

Klaksvíkingar vóru eitt sindur vónbrotnir um, at tað ikki eydnaðist at vinna í Runavík. Men teir halda fýra stig burturúr vitjanum hjá GÍ og NSÍ vera at liva við. Ikki minst tá ið hugsað verður um, at tað tilsaman bara fekst eitt stig burturúr útidysti í Fuglafirði og heimadysti móti B68.

Sinisa Jovanovic var ikki við í Runavík. Hann vandi týskvøldið, og teir rokna við, at hann verður førur fyri at spæla sunnudagin. Tað fer ivaleyst at bera við sær, at Atli Danielsen aftur verður fluttur fram á miðvøllin.

- Eftir tvey góð úrslit á útivølli er neyðugt hjá okkum at fáa fulla úrtøku á heimavølli. Tað hevur eydnast illa higartil, men gongdin seinastu ferðirnar hevur borið boð um nýggjar tíðir, og tað vóna vit eisini fer at síggjast aftur á heimavølli, siga teir í KÍ.